
MYNDIR: JENS KRISTIAN VANG

*Joen H. Andreasen, fyrsti umboðsmaður í Føroyum, Róbert Spano, professari við Háskóla Íslands, Sólja í Ólavsstovu, verandi umboðskvinna, og Sjúrður Rasmussen, ráðgevi á Løgmansskrivstovuni*

tí hvør hevði nóg stórt trúvirði til tess? Sjálvur hevði hann havt eittans svar upp á tann spurningin – Guttormur í Múla. Tá rungaði láturin í Norðurlandahúsinum.

Sjúrður Rasmussen vísti skemtandi á, at Guttormur í Múla var lágvaksin, men sterkur, vitandi, ikki sørur í gandi, lógkønur og hevði stóra virðing millum manna. Haraftrat setti ongin spurnartekn við tað, ið maðurin segði. Helst mátti ein umboðsmaður hava allar hesar dygdir, og tað bar neyvan til, hevði hann hildið. Ráðini hjá Sjúrði Rasmussen vóru tí upprunaliga, at landsstýrismálanevndin varð styrkt við einum løgfrøðiligum sekreteriati, og at borgarar fingu betri møguleikar at fáa fría rættargongd. Hann mintist eisini, at áhugin fyri umboðsmanninum var lítil, áðrenn stovnurin kom.

»Fólksligi áhugin fyri umboðsmansstovninum tóktist at vera sera lítil í 90'unum. Eg minnist, at Fróðskaparsetur Føroya hevði boðið til almennan fyrilestur, har danski, norski og íslendski umboðsmaðurin vóru við. Sjálvur møtti eg upp at lurta. Umframt teir almennu fylgisneytarnar við umboðsmonnunum vóru vit tríggir áhoyrarar,« segði Sjúrður Rasmussen, og enn einaferð rungaði láturin, tí søgan lýsti væl, hvussu striltið hevur gingist at fáa umboðsmansstovnin settan á stovn síðan 1978, tá Jógvan Sundstein legði fyrsta uppskotið um tílíkan stovn fram.

## Góða nyttu í Íslandi

Nú hevur løgtingsins umboðsmaður so virkað í 10 ár, fyrst við Joen H. Andreasen í stjórastarvinum og síðan við Sólju í Ólavsstovu. Bæði Sjúrður Rasmussen og Johnhard Klettheyggj hildu, at væl er komið burturúr hjá umboðsmanninum, og Róbert Spano segði, at umboðsmaðurin í Íslandi hevði gjørt stóran mun, síðan hann kom í 1988. Tann fyrsti, sum var umboðsmaður í Íslandi, var Gaukur Jörundsson, professari. Hann hevði umboðað Ísland í nevndini fyri mannarættindi hjá Evroparáðnum, og hetta ávirkaði straks nýggja stovnin.

Gaukur Jörundsson gjørdist eitt nú varugur við, at íslendska grundlógin ikki ásetti øll tey grundleggjandi mannarættindini, sum í altjóða samfelagnum vóru sjálvsøgd. Tá hann tók við, høvdu ásetingarnar í grundlógini um mannarættindi nærum verið óbroyttar, síðan Ísland gjørdist lýðveldi í 1944. Tann evropeiski mannarættindasáttmálin var settur í gildi í Íslandi í 1953, men løggávan var ikki dagførd. Hetta fekk hann broytt við at mæla til ymsar ábøtur á løggávuna, og ásetingarnar um mannarættindi í grundlógini vórðu eisini broyttar. Róbert Spano tók samanum:

»Tey 23 árini, sum altingsins umboðsmaður hevur virkað, hevur hann avgreitt 7.000 mál ella í meðal 300 mál um árið. Hóast eg ikki kann kallast óheftur, tí eg arbeiddi hjá umboðsmanninum í 14 ár, haldi eg ongan iva vera um, at ávirkanin hjá umboðsmanninum á fyrisitingina og fyrisitingarrættin hevur verið stór og góð. Nógv úrslit eru rokkin, hvat viðvíkur at fáa umsitingina at taka fakligar avgerðir samsvarandi meginreglunum í fyrisitingarrættinum, hóast sjálvandi ikki er komið á mál allastaðni enn.«

Róbert Spano tók eisini samanum, hví borgararnir viðhvørt kunnu hava brúk fyri einum umboðsmanni at viðgera teirra kærur mótvegis myndugleikunum:

»Jú størri vald myndugleikarnir hava, og jú meira teir ráða yvir lívinum hjá borgarunum, jú máttleysari kennir borgarin seg ímóti hesum ovurstóra valdinum. Ein liðiligur útvegur sum umboðsmaðurin, ið er lætt atkomiligur og kostar lítið, kann minka um kensluna av máttloysi hjá borgarunum mótvegis myndugleikunum. Umboðsmaðurin dømir ikki, men hevur fyrst og fremst eftirlit við legalitetinum,« segði hann.